komið væl við í redaktørarbeiðnum.

Merkisvert er tað, at tað hevur borið til hjá Jan – samstundis sum hann hevur røkt leiðsluuppgávurnar at leggja til rættis, at ganga undan, at vera íblásari og ikki minst at syrgja fyri góðum trivnaði – at dyrka nýtt journalistiskt lendi. Serliga hevur hann verið hugtikin av og skrivað um teir, sum hava roynt okkurt alternativt: svartkjafturin og Jens Eli Ellefsen og Mortan Johannesen, aling av sílum og laksi og Andrias Reinert, aling av gággum og kræklingi hjá Knút Nolsøe, vatnorkuútbyggingin hjá SEV og møguligar umhvørvisligar avleiðingar, John Smith, sáli, og burðardygg fiskivinna, kaldbaksbátarnir og royndirnar hjá Guttormi Djurhuus, sála, í India, ferðafrásøgnir úr Egyptalandi saman við Hermani Jacobsen, sála´og kolaferðin til Svalbard saman við Tormóti Dahl, sála, vóru dømi um hetta.

Nógvu tey seinastu árini hevur oljan – ella OL Jan sum tað viðhvørt verður sagt í Miðlahúsinum - verið á dagsskránni, og tað er ikki eiti á oljusambondum, sum Jan hevur kring allan knøttin. Hann hevur ferðast víða og eitt nú lýst oljuvinnuna í Alaska, og fleiri ferðir hevur hann vitjað á boripallum. Seinastu mánaðirnar hevur hann arbeitt við fyrireikingum av bók um oljuna, og tá eru vinklarnir so nógvir – eitt nú yvirtøkan av undirgrundini, marknaðarsamráðingarnar við Bretland og árinið á samfelagið og mentanina.

Altjóða áhugamálini hava ofta verið viðgjørd. Jan var heitur talsmaður fyri frælsisstríðnum hjá ANC í Suðurafrika og Namibia. Hann hevði saman við vinmanninum og samverkamanninum Jóannesi Dalsgaard samband við frælsisrørslurnar har suðuri, og eina ferð sendi Sosialurin sjálvum Nelson Mandela innbjóðing um at vitja í Føroyum.

Almenna kjakið hevur í Jan Müller átt ein av sínum fremstu forsprákarum. Kjak á Tinghelluni í blaðnum, í Miðlahúsinum og á Rás2 varð raðfest høgt. Saman við Kára á Rógvi og øðrum eydnaðist tað at geva kjakgreinar út í bók, og Óla P tekningarnar eru fastur jólagestur.

Møguleikin fyri synergi ávirkan av at hava fleiri pallar at arbeiða á hevur fasinerað Jan, og hann hevur gjørt nakað við hetta. Ein av fruktunum eru ólavsøkuframsýningarnar í Smiðjuni í Lítluvík og síðani í Miðlahúsinum. Umframt tekningarnar hjá Óla P hevur so mangt annað forvitnisligt verið sýnt fram, og tað hevur virkað við til, at ólavsøkulív er komið í Vágsbotn og Tórsgøtu.

Tað er ilt at skilja, at tað hava verið stundir til annað enn tíðindi, blað og aðrir miðlar hjá honum, sum støðugt hevur verið "on", og sum árla og síðla og gerandis og heilagt hevur verið klárur í orðum og myndum at dekka tiltøk og hendingar. Frítíð og arbeiði hava verið eitt, og tá ið Jan spennir frá, so er tað í svimjihylinum í Gundadali ella við billiardborðið, har hann í fjøruti ár hevur verið millum teir stinnastu í landinum. Samstundis hevur Jan eisini í mong ár verið nevndarlimur í Tryggingarfelagnum Føroyar.

Longu í barnaárunum á Landavegnum arrangeraði Jan tiltøk og kappingar. Hann var gulur skóti, og altjóða skótalegan í Idaho í 1967 er glæsiligt minni. Jan hevur roynt seg í fótbólti í B36, hondbólti í Neistanum og umborð á Sílinum hjá Havnar Róðrarfelag.

Jan er giftur Tove Thomsen úr Klaksvík. Hon er rólig, tolin og góður sparringspartnari. Børn teirra eru Durita og Eyðun og John, sum Tove átti frammanundan. Í morgin, leygardagin 2. apríl, verður 60 ára føðingardagurin hildin heima við hús, har tað verður opið hús í Sleipnisgøtu 10 á Norðasta horni frá klokkan 13.

**JHa**

# Jan Müller seksti



Í morgin fyllir Jan Müller seksti, og samstundis hevur valt sær aðra lívsleið enn arbeiðsplássið seinastu 33 árini, Sosialin og seinni Miðlahúsið.

Jan er kendur sum tann ídni tíðindamaðurin, og fólk, sum hava starvast saman við honum, verða ferð eftir ferð ovfarin av hansara ótroyttiliga ídni fyri fakinum og blaðnum.

Jan kom í starv á Sosialinum í 1978 sum nýútbúgvin journalistur frá Journalistháskúlanum í Århus. Hann hevur sjálvur sagt, at orsøkin til at hann valdi blaðmannayrkið partvís var genetisk – pápi hansara, Eiden Müller, var ein av teimum fyrstu útbúnu føroysku journalistunum, men hann hevur eisini altíð havt ein brennandi áhuga fyri at skriva og lýsa tað, sum er kring hann –sum eisini botnar í áhuganum fyri samskiftinum millum menniskju.

Í 1984 tók Jan Müller við sum blaðstjóri á Sosialinum sama við Krisjan Dahl, sum var politiskur blaðstjóri og fyritaksstjóri. Krisjan Dahl doyði í 1998.

Jan var soleiðis blaðstjóri, tá Sosialurin í 1990 økti útgávurnar frá trimum upp í fimm – og hevði menningin og postverkið viljað tað eitt sindur øðrvísi, so hevði hann farið undir ta sættu útgávuna eisini, áðrenn aðrir og skjótari miðlar tóku yvir, og blaðið sum skjótur tíðindaberi misti sína støðu.

Jan var eisini á Sosialinum, tá blaðið í 1982 flutti út í nýggju blaðhúsini á Argjum og harvið eisini fekk egna prenstmiðju. Menningin hevur verið stór í hansara tíð, blaðið kom á internetið í 1997, og ikki minst tilgongdin til talgildu arbeiðsgongdina - sum førdi til, at blaðið í 2000 var fult digitaliserað.

Men eitt tað største arbeiðið hjá Jan Müller er at hava staðið fyri at flyta blaðið frá eini partapolitiskari flokspressu til eitt fólksligt tíðindablað. Hetta hevur hann so ofta nevnt sum sjálvan eksistensin hjá Sosialinum – og um tann broytingin ikki varð gjørd, so hevði Sosialurin liðið blaðdeyðan. Hendan tilgongdin byrjaði longu í sjeytiárunum og varð endaliga staðfest, tá Javnaðarflokkurin fyri fimm árum síðani seldi blaðið.

Síðani Sosialurin í 2005 flutti av Argjum og heim í Miðlahúsið í Vágsbotni er fyritøkan eisini nógv ment. Í 2007 varð útvarpsstøðin Rás2 keypt og løgd afturat virksemini í Miðlahúsinmum, sum frammanundan eisini fevndi um tíðindini á www.portal.fo, sum er nógv mest vitjaða føroyska heimasíða.

Seinasta árið hevur Jan fingist við at skriva bók um føroysku oljusøguna, ið hann sum eygleiðari kennir sum fáur – og hana gleða vit okkum at sleppa at lesa.

Vit ynskja Jan hjartaliga tillukku og bestu eydnu framyvir!

**Starvsfelagar**

